# ast við róðrið

g Mathea Hilduberg trívast best við
gd. Tær stíla høgt, tær krevja úrslit, og
nnur skulu tora betri, hóast tað til tíðir
ka hart á



## Mathea Hilduberg

**Eins og stórasystir eru tvær útbúgvingar fingnar til høldar. Eftir eitt tíðarskeið í danska BG Bank gjørdist hon m.a. marknaðar- og projektleiðari í Føroya Sparikassa, síðani vóru boð eftir henni á Løgmansskrivstovuni, áðrenn leiðin gekk í sess sum fíggjarleiðari á fiskasøluni og landingarmiðstøðini Snodd á Toftum. Karrieran tók eina vend, tá hon gjørdist stjóri á Listaskálanum, men hon takkaði fyri seg eftir bert trimum mánaðum og gjørdist aftur fíggjarleiðari á Snodd. Samstundis tekur hon sær eisini av tølunum á Kongshavnar Trolarafelag.**
**Sjálv sigur Mathea, at hon er innovativ, hon elskar nýggjar uppgávur, og so metir hon, at føroyskar kvinnur skulu tora betri.**

Aalborg Universitet. Tað var spennandi at hava nógv jørn í eldinum samstundis, og mín sjónarringur víðkaðist.

### Dirvi

*Tit hava báðar gjørt um tykkum og hava eftirhondini havt fleiri leiðandi sessir, og í øllum javnstøðukjakinum eru tit í ein mun tvær atypiskar systrar. Hvaðani kemur henda náttúran?*

**Mathea:** Tað er sjálvsagt torført at siga, hvat skapar eitt menniskja, men vit vóru sera tíðliga uppdrignar at vera sjálvstøðugar, at vinna okkara egna pening og taka ábyrgd av okkara egnu lívsførslu.

**Rúna:** Ja. Vit eru uppvaksnar við at taka egnar avgerðir og klára okkum sjálvar, og hetta hevur helst verið ein orsøk til, at vit báðar hava torað at tikið við avbjóðingum.

*Hvør er so orsøkin til, at vit framvegis hava so skeivt kynsbýti í Føroyum?*

**Mathea:** Tað finnast nógvar kvinnur við beini í nøsini, sum hava eina flotta karrieru, og sum klára seg væl, men kynsbýtið er framvegis sera ójavnt, og tølini tala greitt.

Møguliga er ein partur av orsøkini, at kvinnur verða í ein mun uppdrignar til at halda lágan profil og ikki seta seg sjálvar í miðdepilin. Men tað nýtist ikki at vera so. Eg havi gjørt tað, eg havi havt hug til, og eg havi ikki hugsað so nógv um, at eg eri ein kvinna. Eg eri eitt menniskja, sum havi somu rættindi og møguleikar sum hini uttan mun til kyn, og eg havi ongantíð merkt, at tað er nøkur forðing at vera kvinna.

**Rúna:** Serliga eru kvinnurnar fámentar í privatu vinnuni. Um vit hyggja at stjórum og nevndarlimum í privata sektorinum, eru syndarliga fáar kvinnur at síggja, og tað er ikki tí, at kvinnur ikki hava hug. Eg kundi uppá standandi fót nevnt tær 20 kvinnur, sum høvdu verið áhugaðar at engagera seg í privatu vinnuni, men tað vísir seg at vera torført at sleppa framat, tá hetta umhvørvið longu er so mansdominerað.

Hetta kann kallast "Rip, Rap og Rup-effektin". Tá Rip og Rap skulu velja ein nýggjan persón at seta í starv, so velja teir í flestum førum Rup. Tað vil siga, at teir heilt instinktivt og automatiskt velja ein, sum líkist teimum, og sum teir kunnu identifisera seg við. Við øðrum orðum vil ein maður í flestu førum velja ein mann, eins og ein kvinna vil velja eina kvinnu, og hetta er mynstrið og óndi sirkulin, um eitt øki fyrst gerst ov dominerað av einum ávísum bólki, sum talan er um í privatu vinnuni. Hesar sálarligu mekanismur er ein orsøk til, at tað er torført at fáa broytingar í lag.

*Men hava kvinnurnar sjálvar so onga skuld í, at býtið er so skeivt?*

**Mathea:** Jú, sjálvsagt. Føroyskar kvinnur skulu í ein mun gevast at vera so sjálvhátíðarligar. Tær skulu tora at "dumma seg" og gera mistøk, og tær skulu við øðrum orðum tora betri at vera tær, tær eru. Eg havi lært, at um tú eisini torir at vísa tínar veikleikar, kemur tú langt.

*Hava tit í tykkara leiðandi sessum nakrantíð upplivað kynsdiskrimination?*

**Rúna:** Eg vil siga, at menn og kvinnur verða lýst ymiskt, hóast orð skulu setast á júst teir somu eginleikarnar. Meðan ein maður er framfýsin, fær sítt ígjøgnum og hevur "handlekraft", verður ein kvinna við júst somu atferð og sinnalagi í staðin løgd undir at vera skrøpp, agressiv o.s.fr. Frá at vera positiv gerast lýsingarorðini um eina kvinnu meiri negativ, og tí skal ein kvinna í Føroyum møguliga tola meiri atfinningar samanborið við ein mann. Hetta havi eg t.d. fingið smíðað á mín rygg í mínum leiðandi sessum, meðan vit ongantíð høvdu sagt um ein mann, at hann var skrappur og agressivur, bert tí hann var viljasterkur, kravdi ein innsats og setti sær nøkur mál. Tað er meiri óvanligt at síggja eina kvinnu gera seg galdandi, og tí verður hon heilt náttúrliga lýst øðrvísi enn ein maður.

Sjálvsagt skulu føroyskar kvinnur eisini taka í egnan barm. Men eg haldi, at kvinnur í leiðandi størvum í ein mun skulu finna seg í viðurskiftum, sum menn ikki uppliva í sama mun. Tí kann tað av og á tykjast torførari fyri kvinnur enn menn at gera seg galdandi og standa við róðrið, tá tær mugu á ein hátt tola hesar øðrvísi umstøður, sum menn ikki skulu ígjøgnum. Hetta setir ymisk krøv til kynini, og tað skulu kvinnur við ambitiónum vera tilvitaðar um.

### Fakta um Matheu

Útbúgving: Cand.merc. og Master í samskifti og uttanríkishandli.
Arbeiðsroyndir: Leiðaratrainee í BG Bank, marknaðar- og projektleiðari í Føroya Sparikassa, fulltrúi á Løgmansskrivstovuni, stjóri á Listasavnið Føroya og fíggjarleiðari á p/f Snodd og Kongshavnar Trolarafelag